# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Føðingar



*Nátanael, sum er 1 ár, fekk 26. oktober ein beiggja. Mamma og babba eita Irena og André.*

21. oktober fingu Vónbjørt og Sólarn Somunde, Gøtu, ein son. Hann var 56 cm langur og vigaði 4000 gr.

22. oktober fingu Bryngerð og Hans Andrias Thomassen, Klaksvík, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3800 gr.

22. oktober fingu Jona og Eystan í Lon, Húsum, eina dóttur. Hon var 56 cm long og vigaði 4100 gr.

24. oktober fingu Valbjørg Steintún og Hanus Gaard, Tórshavn, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3300 gr.

26. oktober fingu Eyðdis og Signar Skaalum, Trongisvági, eina dóttur. Hon var 54 cm long og vigaði 3850 gr.

26. oktober fingu Irena og André Matras, Norðoyri, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3950 gr.

26. oktober fingu Ruth á Plógv, Sandavági, og Petur Nolsøe Reinert, Tórshavn, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 2800 gr.

26. oktober fingu Elin Winther Nielsen og Benny Nielsen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm langur og vigaði 3600 gr.

27. oktober fingu Birita Baldvinsdóttir og Jóannis Iversen, Tórshavn, ein son. Hann var 49 cm langur og vigaði 3325 gr.

28. oktober fingu Ewelina og Jan Joensen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3400 gr.

28. oktober fingu Gurli Eysturtún Jensen, Tórshavn, og Peter Christian Stenland, Chicago, USA, ein son. Hann var 53 cm langur og vigaði 3300 gr.

28. oktober fingu Naja Ellingsgaard og Magni Mohr, Eiði, ein son. Hann var 50 cm langur og vigaði 3000 gr.

28. oktober fingu Jana Egilstoft og Torkil Nielsen, Sandavági, eina dóttur. Hon var 49 cm long og vigaði 2090 gr.

29. oktober fingu Sissal Rasmussen og Jákup Sørensen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm long og vigaði 3700 gr.

## Borgarstjórin í Klaksvík 55 ár



Hósdagin 30. oktober fylti borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn O. Jacobsen, 55 ár. Steinbjørn er føddur og uppvaksin á Vágsheygnum.

Pápi Steinbjørn var Rasmus Jacobsen, vanliga nevndur Rasmus hjá Óla Jákup, og mamman er Kristina Jacobsen, ella Kristina hjá Sámal í Lorvík. Steinbjørn vaks upp á Vágsheygnum í húsunum hjá abbanum beint við fótbóltsvøllin.

Hann fór sum 16 ára gamal til Havnar, har hann lærdi til múrara og hevði sítt egna múraravirki til 1984, tá hann fór at arbeiða hjá Húsalánsgrunninum. Hetta starvið hevði hann til hann um ársskiftið 2000/2001 bleiv borgarstjóri í Klaksvík.

Steinbjørn er giftur við Sunnevu, f. Joensen, úr Klaksvík, tey eiga fimm børn: Sigurð, Kristvør, Heri, Rógvi og Rasmus.

Ólavur Poulsen:

# Nýggjur virkisleiðari á Føroya Fiskavirking í Miðvági

**Mánadagin 3. november tekur Ólavur Poulsen í Vatnsoyrum við sum virkisleiðari á P/F Føroya Fiskavirking í Miðvági**



Ólavur er 50 ára gamal, hann hevur útbúgving frá Fiskivinnuskúlanum í Íslandi við áherðslu á framleiðslu, góðsku og búskap.

Eftir lokna útbúgving arbeiddi hann innan fiskivinnufakið í 16 ár, umleið helvtina av tíðini uttanlands. Hann arbeiddi í góðskueftirlitinum hjá Føroya Fiskasølu og á Chaldur í Grimsby, var virkisleiðari á Nordafar í Grønlandi, góðskuleiðari og framleiðsluráðgevi á Ilulissat Fiskeindustri í Grønlandi, framleiðslustjóri og virkisleiðari á African Seafood í Senegal. Eisini hevur hann havt ymiskar aðrar uppgávur í fiskivinnuni.

Seinastu árini hevur Ólavur arbeitt í øðrum vinnugreinum innan avgreiðslu og sum virkisleiðari.

Ólavur er giftur við Astu, f. Østerø, av Trøllanesi, tey eiga fýra børn.

# Hady og Manne Næs gift í 45 ár



*Hady og Manne Næs. Í 50-unum gav Manni Útvarpi Føroya plátuna, "Vi skal gå hånd i hånd gennem livet du og jeg....", saman við eini heilsan til konuna. Hesin hevur síðani verið teirra sangur.*

Dagurin í dag er ein merkisdagur, tí í dag, 1. november, eru liðin 45 ár síðan Hady og Manne Næs gingu upp eftir kirkjugólvinum í Hvalbiar kirkju og framman fyri altarinum lovaðu fyri Gudi og monnnum at elska hvørt annað og liva saman í við- og mótburði, og tað hava tey so sanniliga gjørt.

Sum ung lærdu bæði í Keypmannahavn, Hady til hárfríðkannarkvinnu og Manne til keypmann. Eftir lokna lærutíð fluttu tey aftur til heimbygdina, har tey settu búgv og fingu børn.

Hady fekk sær egna hárfríðkanarstovu og Manne arbeiddi tey fyrstu árini í Grønlandi á skrivstovuni í Føringahavnini, síðani kom hann heim aftur og hevur verið keypmaður, reiðari, o.m.a.

Sum í ævintýrunum blivu tey gift, fingu børn og liva vónandi lukkuliga nógv ár afturat.

Genturnar fingu tey fýra í tali, Sigrun, Maud, Ingun og Nitu, og tey høvdu næstan mist vónina um at fáa prinsin, men eftir 20. brúdleypsdagin hilnaðist, og tey fingu endiliga ein son, Magnar Haldur, og øll sóknin frøddist saman við familjuni. Ommu- og abbabørnini eru 6 í tali, Margretha, Hanus, Sissal Randarsól, Bartal, Manni og Elma.

Vit øll ynskja tykkum hjartaliga tillukku við 45-ára brúdleypsdegnum og alt gott framyvir við takk fyri alt tit hava verið og eru fyri okkum.

Dagurin verður hildin, sum brúdleypsdagurin vanliga altíð hevur verið hildin, við einum drekkamunni í heiminum aftaná minningarhaldið yvir teir sjólætnu.

**Børnini við familju**



# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Petur Ove Ellingsgaard 80 ár



Mánadagin 3. november, fyllir Petur Ove Ellingsgaard í Klaksvík 80 ár. Petur Ove er ættaður av Eiði og flutti í 1941 til Klaksvíkar, har hann byrjaði í læruplássi á sleipistøðini hjá J. F. Kjølbro. Eftir lokna lærutíð sum maskinmaður, sigldi hann í mong ár sum meistari við skipum hjá Kjølbro, t.d. við Skálabergi, ið kom til Klaksvíkar í 1956. Stutt eftir at Kjølbro fyrst í sekstiárunum keypti Pride og setti hann í fasta rutu millum Klaksvík og Tórshavn, fór Petur Ove sum maskinmaður umborð á hetta tá stásiliga ferðamannaskip. Í 1968 fór Petur Ove undir at reka maskinverkstað uppi á Vágsheygnum. Verkstaðurin POMEK heldur nú til í reyðu høllini uppi við Borðoyarvík og ikki er frítt, at Petur Ove enn er at síggja á verkstaðnum.

Petur Ove giftist í 1949 Ragnhild, dóttir Jógvan Segl og Henriettu. Tey fingu fýra dreingir. Tveir teirra búgva í Klaksvík, ein í Tórshavn og ein í Klintebjerg, norðan fyri Odense. Abbabørnini eru seks í tali. Petur Ove gjørdist einkjumaður í 1990.

## Jenny Samuelsen prógv sum receptionistur



Í dag, 1. november, hevur Jenny Samuelsen í Havn lokið endaligt prógv sum receptionistur.

Jenny, ið er 22 ára gomul, byrjaði sum hjálparfólk á Hotel Hafnia sum 15 ára gomul, serliga arbeiddi hon sum tænari.

1. september 2000 fór hon í læru sum receptionistur á Hotel Hafnia. Lærutíðin hevur sostatt verið 3 ár og 2 mánaðir.

Jenny hevur verið 3 skifti á 10 vikur á Aalborg Tekniske Skole, har hon hevur tikið ástøðiliga partin.

Hon fekk medalju fyri besta karakterin á skúlanum, og tvey onnur heiðursprógv, eitt fyri at vera besti næmingur í flokkinum og eitt fyri ídni og dirvi at flyta seg fakliga.

Verkætlanin (projektið), sum hon gjørdi til royndina, var um føroyska ferðavinnu, serliga við atliti til ferðamannaskip

3. oktober fekk hon prógv og heiðurstekin handað á Aalborg Tekniske Skole.

Lærumeistari hennara hevur verið Sunniva Arge.

Jenny er dóttir Súsonnu og Alexander Samuelsen í Havn.

## Eyðun á Rógvi 60 ár



Hin 30. oktober fylti Eyðun á Rógvi 60 ár. Eyðun er mest kendur sum stjóri fyri Líkningarráð Føroya og Føroya Sparikassa, men lívið hjá Eyðuni hevur eisini verið annað enn tøl.

Lívsleiðin hjá Eyðuni byrjar í Sjóvarbø í Vestmanna, haðani hann er ættaður. Sum tann yngsti av fimm systkjum - og sum tann einasti drongurin í flokkinum - varð Eyðun borin í heim í 1943. Pápi Eyðun, Meinert Olsen, ættaður úr Skálum í Vestmanna, doyði longu tá Eyðun var smádrongur. Mamman kallaðist Gullborg á Rógvi. Hon hevði í nógv ár kiosk í Vestmanna. Gullborg doyði í 1990.

Sum sekstan ára gamal fór Eyðun úr Vestmanna. Leiðin gekk til Sorø Akademi kostskúla á studentaskúla. Eftir lokið studentsprógv, átti Århus og búskaparfrøðin næstu árini hjá Eyðuni. Í Århus var hann millum annað við til at seta føroyingafelagið í býnum á stovn. Í 1972 kundi hann seta cand.oceon afturat navninum. Sum so mangur annar legði hann leiðina til Føroya. Fyrsta starvið var fíggjarstjóri hjá Poul Hansen heilsølu. Àrið 1972 var eisini tað árið, tá Eyðun gekk í hjúnalag. Í Århus hitti hann Sunnevu Dalsgaard, og tey bæði giftust í Vestmanna í februar 1972, og hava tey verið gift í 31 ár.

Tey bæði fingu sítt fyrsta barn í 1973, og hetta árið fór Eyðun eisini í starv sum stjóri fyri Líkningarráð Føroya, sum seinni gjørdist onnur helvtin av Toll- og Skattstovu Føroya.

Hetta starv røkti Eyðun til 1985, tá boð vóru eftir honum at gerast partur av leiðsluni í Føroya Sparikassa. Hann byrjaði sum varastjóri, men tók seinni við sum forstjóri. Eyðun stjórnaði Føroya Sparikassa gjøgnum tungu kreppuárini miðskeiðis í hálvfemsunum til 1999, tá hann gjørdist álvarsliga sjúkur og ikki kundi halda fram í starvinum.

Eyðun hevur eisini partur av ymsum nevndum. Millum annað var hann formaður í Ráfiskagrunninum í sjeytiárunum.

Sum vestmenningurin er ikki løgið, at Eyðun hevur stóran áhuga fyri jørð og seyði. Hann eigur jørð í Neshaga og Ùtihaganum á Bjørgnum í Vestmanna. Nógva tíð og orku nýtir hann til seyðin, og eitt nú í lembingini vitjar hann mestur meira enn einaferð dagliga í Vestmanna.

Við fleiri ára royndum er Eyðun vorðin royndur pensjónistur, og hann er millum annað vorðin ein habilur bridgespælari.

Eyðun og Sunneva eiga børnini Kára, 30 ár, Elina, 27 ár, og Hera, 21 ár.

## Ejler Sørensen 75 ár



Í dag, 1. november, fyllir Ejler Sørensen, Porkeri, 75 ár. Ejler er føddur og uppvaksin í Porkeri. Næstyngst av 5 systkjum. Foreldrini vóru Petur Sørensen, Petur undir Stígnum, og Sunneva dóttir Lávus í Skemmuni, bæði úr Porkeri.

Ejler tók koyrikortið í 1948. Tey fyrstu árini koyrdi hann lastbil. Seinni fekk hann sær buss og persónbil og koyrdi rutu- og hýruvognskoyring.

Tá Bygdaleiðir byrjaði í 1984, fór Ejler saman við øðrum at koyra busskoyring, og røkti hann hetta starv til hann gavst í 1998 vegna aldur.

Ejler giftust í 1956 við Sunnevu, fødd Magnussen, úr Porkeri. Tey eiga 4 børn: Mikkjal, Piddi, Dóris og Sirið, og búgva tey øll í Porkeri. Ejler og Sunneva eiga 14 ommu- og abbabørn.

## Dagurin

**November**
Latínska navnið kemur av *novem*, ið merkir 9, sum var talið á níggjunda mánaðinum í gamla rómverska kalendaranum.

**1. november. Alla halganna dagur.** Longu í aðru øld var siður at halda minningardag hjá hvørjum einstøkum blóðvitni á deyðadegnum, men umleið ár 350 varð samtykt at halda minnisdag fyri øll ein dag í árinum, og var hann fyrsta sunnudag eftir hvítusunnu.

Págin Gregorius III ásetti í 731, at dagurin skuldi verða hildin 1. november. Hann varð róptur *Festum omnium sanctorum,* hátíðardagurin hjá øllum teimum heilagu. Eftir trúbótina varð hann avtikin sum fastur halgidagur og varð í kirkjuárinum ásettur til fyrsta sunnudag eftir fyrsta november, men 1. november varð standandi eftir álmanakkanum.

Dagurin er dilkadagur. Tríggir dagar um heystið verða róptir dilkadagar.

Løgtingið samtykti í 1949, at 1. november skuldi verða hildin sum *minnisdagur teirra sjólátnu.*

**2. november. Alla sálna dagur.** Umleið ár 1000 kemur í tann siður at halda minningardag fyri øll, sum farin vóru, og ikki bara fyri halgimennini.

**3. november. Hubertus,** deyður ár 727. Var biskupur í Maastricht eftir Lambertus. Var tiltikin veiðimaður og gjørdist verndarhalgimenni hjá øllum veiðimonnum. Halgisøgan sigur, at hann legði veiðiferðirnar av, tá ið hann ein dagin sá ein hjørt við einum lýsandi krossi millum hornini. Í mongum londum verða havdar sonevndar hubertusveiðiferðir. Haruskjótingin í Føroyum, sum er um hetta mundið, kann sigast at vera ein leivd av hesum siði.

Týskt navn, samansett av orðum, sum merkja *hugur* og *bjartur*.